

## Ronaldinho skiftir til AC Milan

AC Milan hevur vunnið kapprenningina við Manchester City um at tryggja sær brasilska Ronaldinho. AC Milan boðar í kvøld frá, at samráðingarnar við FC Barcelona eru lidnar, og at avtala er gjørd við Ronaldinho. Hann skal í morgin til Milano at kanna, um hann er kropsliga klárur til uppgávuna, og eftir hetta verður sáttmálin undirskrivaður. Sáttmálin er galdandi fram til summarið 2011. 28 ára gamli Ronaldinho hevur skarað framúr í FC Barcelona, har hann skoraði 70 mál í 145 dystum. Hann bleiv kosin heimsins besti fótbóltsleikari í 2004 og 2005, men umdømi hansara er viknað nógv hetta seinasta árið, har skaðar tó hava gjørt alt trupult fyri hann.

## Til UEFA fótbóltsdyst við trolara

Tað skal nógv til at steðga teimum ídnastu fótbóltsfjepparunum. Enska blaðið Daily Mail skrivar í dag, at tólv ídnir Manchester City viðhaldamenn hava leigað ein 72 fót trolara at flyta teir til Føroya til fótbóltsdystin millum EB/Streym og Manchester City. Og hetta er ikki farið óansað aftur við borðinum. Kenda enska fótbóltsblaðið, FourFourTwo, hevur sponsorerað túrin – við øllum øli, teir tólv kunnu drekka á ferðini. Farið verður úr Manchester við bili upp til Aberdeen, síðani við ferju yvir til Lerwick í Hetlandi, áðrenn farið verður umborð á The Three Sisters, sum skal sigla úr Hetlandi til Føroya. Hetta verður uttan iva stuttligasti nakrantíð til ein fótbótlsdyst. Hetta er veruliga fyri fólk, sum ynskja eina uppliving fyri lívið, sigur Leighton Gobbett, sum skipar fyri túrurinum, við Daily Mail.

# Vit eiga at tapa

**- Ein javnleikur hevði verið eitt ótrúligt úrslit, men at tapa við fýra málum er eisini í lagi. Hugsa vit um støddina á feløgunum, so eiga vit tapa, sigur Sigfríður Clementsen, sum í annað kvøld stendur á odda fyri EB/Streymi, sum rennur inn í størstu avbjóðina hjá einum føroyskum fótbóltsfelagi nakrantíð**

FÓTBÓLTUR
*Uni Holm Johannesen*
*uni@sosialurin.fo*

- Vit mugu royna ikki at missa bóltin ov skjótt. Tað kann gerast rættiliga møðsamt at renna aftaná heimsstjørnum allatíð.

Sigfríður Clementsen skal hóskvøldið leiða EB/Streym inn í størstu avbjóðingina hjá einum føroyskum fótbóltsfelagi nakrantíð. Tætti og stundum órakaði havnarmaðurin tykist á ongan hátt ræddur av ógjørligu uppgávuni. Hann fjalir ikki veruleikin, og er fullgreiður yvir, at sundalagsmenn ikki fara at fáa stórvegis ávirkan á úrslitið.




*Ætlar Manchester City at leypa á, so verða vit verjukendir. Taka teir tað eitt sindur av løttum, so møguliga vit sleppa at spæla við í løtum, sigur Sigfríður Clementsen*

### Eiga at tapa

Micah Richards, Martin Petrov og Darius Vassel verða millum forkunnugu gestirnir á Tórsvølli í annaðkvøld. Tað er ímóti øllum logikki at hugsa sær, at lítla og føroyska EB/Streymur fer at koppa enska stórfelagnum í Premier League.

Men Sigfríður Clementsen, hvat er eitt nøktandi úrslit ímóti mæta Manchester City?

- Tað er torført at siga. Ein javnleikur hevði verið eitt ótrúligt úrslit, men at tapa við fýra málum er eisini í lagi. Hugsa vit um støddina á feløgunum, so eiga vit tapa. Men sjálvandi, vit fara ikki inn á Tórsvøll við tí fyri eyga. Tað kennist sum í hópinum, at allir vilja stríðast fyri hesum her, so vit eru klárir, sigur Sigfríður Clementsen.

### City avgerð gongdina

Tað verður helst í verjupartinum, at EB/Streymur skulu verða serliga ansnir. Hóast útgangsstøðið kanska verður heldur verjukent, so verður talan ikki um at broyta uppstilling. Sigfríður Clementsen og EB/Streymur ætla at spæla við tær løturnar, gestirnir geva teimum loyvið til tess.

Tí er torført hjá venjaranum at hava nakað greitt upplegg til dystin.

- Tað verður ikki upp til okkara. Ætlar Manchester City at leypa á, so verða vit verjukendir. Taka teir tað eitt sindur av løttum, so møguliga vit sleppa at spæla við í løtum. Uttan mun til tað, so verður uppgávan sera torført. Mark Hughes er nýggjur í venjarastarvinum, og leikararnir vilja prógva seg til Premier League. Eg vænti, at teir verða sera ágangandi í framrættaða spælinum og avgerða tað í Føroyum, so teir kunnu hugsa um heimligu kappingina beinanvegin. Men nú fáa vit at síggja, sigur ein spentur Sigfríður Clementsen.

Mikkjal Thomassen skifti í vetur til EB/Streym, og ætlanin var, at tit skulu fáa gagn av hansara royndum. Er tað ikki sera harmuligt, at hann ikki verður við í annaðkvøld?

- Jú, sjálvsagt. Vit hava heldur ikki Høgna Zachariasen og Sorin Anghel tøkar. Men tað hjálpir ikki at hugsa um tað. Vit stríðast við tí liðnum, sum vit hava nú, sigur havnarmaðurin í Sundalagnum.

Hagtølini eru í øllum førum við EB/Streymi. Venjaratoymið Sigfríður Clementsen og Magni Mohr hevur hvørjaferð vunnið seg úr fyrsta umfari í Evropa. Hetta var við B36 í 2005 og 2006. Hartil eru EB/Streymur eisini ósigraðir á heimavølli í altjóða fótbólti. Spurningurin er tí, um Manchester City fer at leggja bein fyri flottu hagtølunum....

# Formaðurin gleðir seg




*Nú er alt komið upp á pláss, sigur Rólant Højsted*

**Eftir at hava arbeitt frá morgni til myrkurs seinastu vikurnar, fer Rólant Højsted, formaður, í morgin at kunna seta seg aftur á og njóta dystin**

FÓTBÓLTUR
*Rólant Waag Dam*
*rolant@sosialurin.fo*

Rólant Højsted er formaður í EB/Streymi. Hann hevur nóg illa fingið blund í eyga tær báðar seinastu vikurnar. Men tey eru fleiri kring felagið, ið hava havt tað upp á sama máta.

– Vit hava nógv góð fólk í felagnum, sum hava tikið takið. Frá fyrsta degi býttu vit okkum í smærri arbeiðsbólkar, sum so hava tikið sær av ymisku uppgávunum, umframt at fólk úti frá eisini hava bjóðað seg til, greiðir Rólant Højsted frá.

Tað er eitt ovurhondsstórt apparat, sum er farið í gongd hjá EB/Streymi. Allar kringumstøður til stóra dystin skulu fáast í rætt lag. – Vaktir, sjúkraflutning, løgregla, trygd, ramsar Rólant Højsted.

– Men eg vil siga, at nú er alt komið upp á pláss, sigur formaðurin í EB/Streymi.

### Leypa ikki framav

Nú gleðir hann seg ótrúliga nógv til at dysturin byrjar. Størsti dysturin nakað føroyskt felag hevur spælt. Rólant Højsted leypir tó ikki framav av hesi orsøk. – Vit spæla aftur í næsta ár. Og síðsta ár vóru vit eitt mál frá at møta Blackburn, sigur Rólant Højsted og vísur harvið á, at møguleikarnir at møta stórfeløgum eru ofta til staðar.